## ÍF-EB/Streymur 1-1 (0-1)

**0-1: Bjarni Jørgensen, 55.**
**1-1: Rógvi Jacobsen, 90.**
Dómari: Petur Reinert

**ÍF:** Jákup Mikkelsen – Áki Petersen, Poul Ennigarð, Høgni Zachariassen, Jan Ellingsgaard – Dánjal á Lakjuni (Øssur Dalbúð, 55.), Fritleif í Lambanum (Rógvi Jacobsen, 70.), Karl Løkin, Alexandur Jovevic (Frank Poulsen, 62.), Andy Olsen – Nenad Saric
*Gul kort:* Fritleif í Lambanum, Poul Ennigarð
**EB/Str.:** René Tórgarð – Gert Hansen, Egil á Bø, Dánjal Davidsen (Brian Olsen, 37. (Gudmund Nielsen, 46.)), Alex Santos – Hans Pauli Samuelsen, Kristoffur Jacobsen, Pætur Dam Jacobsen, Bjarni Jørgensen – Arnbjørn Hansen, Leif Niclasen
*Gul kort:* Gudmund Nielsen




## Víkingur-HB 0-0

Dómari: Eiler Rasmussen

**Víkingur:** Geza Turi – Sverri Jacobsen, Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Bárður Hansen (Hjartvard Hansen, 85.) – Sølvi Vatnhamar, Hans Pauli Petersen (Kaj Leo í Bartalsstovu, 70.), Sam Jacobsen, Nenad Stankovic, Finnur Justinussen – Súni Olsen
*Gul kort:* Hans Pauli Petersen, Sverri Jacobsen
**HB:** Marcin Dawid – Rógvi Holm, Fróði Benjaminsen, Þórður Steinar Hreiðarsson, Pætur Jørgensen – Símun Samuelsen, Kári Nielsen, Milan Kuljic (Tór-Ingar Akselsen, 73.), Rógvi Poulsen – Levi Hanssen, Andrew av Fløtum (Jógvan Skeel Nolsøe, 90.)
*Gul kort:* Fróði Benjaminsen, Símun Samuelsen




## Dystir um vikuskiftið

**Vodafonedeildin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11/04 | 15.00 | HB-AB | Petur Reinert |
| 11/04 | 15.00 | NSÍ-Víkingur | Lars Müller |
| 11/04 | 15.00 | EB/Streymur-FC Suðuroy | Ransin Djurhuus |
| 11/04 | 15.00 | B71-B36 | Rúni Gaardbo |
| 12/04 | 18.00 | B68-ÍF | Eiler Rasmussen |

**1. deild, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10/04 | 13.30 | HB-TB | Alex Troleis |
| 10/04 | 15.00 | AB-KÍ | Rói Jacobsen |
| 10/04 | 15.00 | EB/Streymur-B68 | Dagfinn Olsen |
| 10/04 | 15.15 | FC Hoyvík-07 Vestur | Johan Petur Michelsen |
| 10/04 | 17.00 | NSÍ-Víkingur | Bent Tommy Linklett |

**1. deild, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11/04 | 13.00 | AB-MB | Búi F. Clementsen |
| 11/04 | 13.00 | Víkingur-KÍ | Johan Petur Michelsen |
| 11/04 | | Skála-EB/Streymur | Henry Heinesen |

**Steypakappingin, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11/04 | 12.30 | B36-ÍF | Jákup L. Stenberg |
| 11/04 | | B68/NSÍ-HB | Elsa Andreasen |

## Føroyska Vodafonedeildin

vodafone deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 2 | 2 | 0 | 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 2 | Víkingur | 2 | 1 | 1 | 0 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 | ÍF | 2 | 1 | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 4 | B68 | 2 | 1 | 0 | 1 | 6 | 3 | 3 | 3 |
| 5 | FC Suðuroy | 2 | 0 | 2 | 0 | 5 | 5 | 0 | 2 |
| 6 | HB | 2 | 0 | 2 | 0 | 4 | 4 | 0 | 2 |
| 7 | EB/Streymur | 2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 8 | NSÍ | 2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 9 | AB | 2 | 0 | 1 | 1 | 6 | 8 | -2 | 1 |
| 10 | B71 | 2 | 0 | 1 | 1 | 3 | 8 | -5 | 1 |

## Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 1 | 1 | 0 | 0 | 5 | 1 | 4 | 3 |
| 2 | TB | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 3 | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 4 | FC Hoyvík | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 5 | KÍ | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 | 07 Vestur | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 7 | NSÍ | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 8 | AB | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 9 | EB/Streymur | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 10 | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 5 | -4 | 0 |

## Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 17 | 0 | +17 | 6 |
| 2 | Skála | 2 | 2 | 0 | 0 | 8 | 3 | +5 | 6 |
| 3 | AB | 2 | 1 | 0 | 1 | 7 | 3 | +4 | 3 |
| 4 | Víkingur | 2 | 1 | 0 | 1 | 4 | 3 | +1 | 3 |
| 5 | EB/Streymur | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 9 | -9 | 0 |
| 6 | MB | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 19 | -18 | 0 |



STIGASVONGD

*HB tekur ímóti AB og EB/Streymur ímóti FC Suðuroy, nú tey bæði bestu liðini í fjør skulu royna at fáa stig á kontuna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# HB og EB/Streymur hungra

**VODAFONEDEILDIN** Tey bæði bestu liðini í landskappingini í fjør hava enn ikki vunnið í nýggju kappingini, so nú eru tey farin at svongjast eftir stigum

Hilmar Jan Hansen

Nú triðja umfar í Vodafonedeildini stendur fyri durum, hevur verið smáligt hjá HB og EB/Streymi, sum vunnu ávikavist gull og silvur í landskappingini í fjør. HB hevur fingið tveir javnleikir og EB/Streymur bara ein, og hvørki liðið hevur enn vunnið.

HB tekur sunnudagin ímóti AB í Gundadali, og burtur úr tí dystinum skal HB hava trý stig, um liðið aftur skal líkjast einum av teimum, ið ætla sær heilt fram ígjøgnum at kappast. Tað sama er uppaftur meira galdandi fyri EB/Streym, sum við Margáir tekur ímóti FC Suðuroy, ið enn ikki er farið av vølli uttan stig.

Dysturin við Løkin millum NSÍ og Víking er eisini ein dystur, har nakað stendur upp á spæl. NSÍ hevur bara eitt stig á kontuni, so tí skal nakað henda ímóti Víkingi, ið hinvegin er næstfremst á stigatalvuni við fýra stigum.

Fjórði dysturin sunnudagin er millum árstalsfeløgini, B71 og B36, sum eru byrjað í hvør sínum enda. B71 er niðast, men er bara eitt av fleiri liðum við einum stigi, meðan B36 hevur lagt fyri sum eitt ódnarveður og er einasta liðið við fullum stigatali.

Mánakvøldið verður fimti dysturin spældur á Toftum, har B68 tekur ímóti ÍF. Toftamenn løgdu bragdliga fyri við stórsigri í fyrsta dystinum, men fingu einki annan páskadag, meðan ÍF hinvegin hevur fingið eina fína byrjan, ið higartil hevur kastað fýra stig og eitt triðjapláss av sær.

*einslistir@kallnet.fo*

# Fyrsti toppdysturin

**1. DEILD** Bæði HB og TB vunnu í fyrsta umfari í næstbestu mansdeildini, og nú spæla tey ímóti hvørjumøðrum

Hilmar Jan Hansen

Bara trý lið vunnu sínar dystir í fyrsta umfari í 1. deild hjá monnum, og tvey teirra hittast tí í toppdysti í morgin. Tey eru HB, sum eisini í fjør var oddalið stóran part av kappingini, og TB, sum higartil sær út sum tað sterkasta av liðunum, ið kunnu flyta upp.

Tvey av hinum, ið kunnu sleppa upp, møtast á niðara vølli í Gundadali, tá FC Hoyvík tekur ímóti 07 Vestur, ið bæði tvey bara fingu javnleik í fyrsta umfari. KÍ, sum spældi javnt ímóti FC Hoyvík páskaaftan, skal hesa ferð spæla á útivølli ímóti uppflytarunum úr AB.

**Kvinnur**

Hjá kvinnunum eru fimm dystir í morgin, tí lægru liðini spæla tveir steypadystir, umframt at fult umfar er í 1. deild hjá kvinnum. Har heldur KÍ væntandi fram við sigursrøðini ímóti Víkingi, meðan AB væntandi reisist aftur ímóti uppflytarunum úr MB.

*einslistir@kallnet.fo*